# Hvat er hent á føðideildini?

**Nú eru eftirhondini nógvar vikur síðani, at vit byrjaðu at hoyra um stríðið á føðideildini. Nú eru 33 yrkisfeløg eisini komin upp í leikin. Men hvat snýr tað seg í veruleikanum um? Vit taka málið í stuttum**

FØÐIDEILDIN
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*

### 8. mars 2005:

**Kunnandi fundur um umleggingar á Landssjúkrahúsinum.**
Landsjúkrahússtjórin kallar inn til ein kunningarfund um ætlaðar umleggingar á m.a. føðideildini. Ætlanin hevur verið leingi ávegis. Upprunaliga var ætlanin ikki, at størv skuldu sparast burtur, men við verandi fíggjarlóg er tað vorðið neyðugt. Ætlaninar verða lagdar út til hoyringar.

### 10. mars 2005:

**Umleggingar á føðideildini á Landssjúkrahúsinum føra við sær at nøkur størv verða spard burtur, men kortini fer tænastan at batna.**
Poul Geert Hansen, stjóri á Landssjúkrahúsinum, sigur við Sosialin, at tað ber til at spara, samstundis sum tænastan til sjúklingin verður betri.

Tað skulu umleggingar, sum ætlanin er at seta í verk á føðideildini og á psykiatriska deplinum, vísa.

Hann sigur, at politiska kravið til Landssjúkrahúsið, er, at 3,5 milliónir skulu sparast í ár.

### 11. mars 2005:

**Umleggingarnar á føðideildini seta trygdina hjá sjúkum pinkubørnum í vanda, sigur Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar**
– Felagið mótmælir harliga ætlanini hjá leiðsluni á Landssjúkrahúsinum, at siga átta sjúkrarøktarfrøðingum á føðideildini úr starvi, samstundis sum annar starvsbólkur verður settur inn á deildina í staðin, sigur felagið í eini hvassorðaðari yvirlýsing.

Felagið sigur, at tað er beinleiðis at reingja sannleikan, tá ið sagt verður, at tað liggur bæði ein sparing og ein menning í hesi ætlan.

### 14. mars:

**Ongin orsøk til at ivast í trygdini hjá pinkubørnum á Landssjúkrahúsinum**
– Tað er óetiskt at siga at trygdin hjá sjúkum pinkubørnum og barnakonum verður sett í vanda á føðideildini á Landssjúkrahúsinum, sigur Eyðfríð Jacobsen, forkvinna í Ljósmøðrafelag Føroya.

### 22. mars:

**Landssjúkrahúsið hótt av verkfalli**
– Umleggingin á føðideildini á Landssjúkrahúsinum er ein krígsavbjóðing.

Sjúkrarøktarfrøðingarnir á Landssjúkrahúsinum hótta nú beinleiðis við verkfalli, verða ætlaðu umleggingarnar á føðideildini á Landssjúkrahúsinum settar í verk.

Tær gera Hans Paula Strøm púra greitt, at tær fara undir ongum umstøðum at góðtaka ætlaðu umleggingarnar.

### 8. apríl:

**Hoyringssvar frá sjúkrarøktarfrøðingunum á A2:**
Okkara niðurstøða er, at LS leiðslan ikki hevur sett seg inn í hvørjar avleiðingarnar verða av ætlaðu umleggingunum. Góðskan til brúkaran versnar munandi. Umleggingarnar fara ikki at geva ein meiri rationellan rakstur, sum LS leiðslan vil vera við.

### 13. apríl:

**Rýma av føðideildini á Landssjúkrahúsinum**
Stemningurin er nú so vánaligur, at tríggir sjúkrarøktarfrøðingar eru farnir av føðideildini og vandi er fyri at enn fleiri fara sama veg

Tveir sjúkrarøktarfrøðingar hava sagt upp og ein er farin í farloyvi.

### 15. apríl:

**Avgerðin tikin: Um ein mánað verður føðideildin umskipað**
Stjórin á Landssjúkrahúsinum sigur, at nógv umstríddu umleggingarnar á føðideildini verða settar í verk og hann vónar at tað kann gerast um ein mánað.

– Ongi røktarstarvsfólk verða søgd upp, men ósett og komandi leys størv, verða ikki sett aftur fyrrenn vit eru komin niður á starvsfólkatalið sum ætlað, sigur Poul Gert Hansen.

### 18. apríl

**Ljósmóður yvirtekur leiðsluna á føðideildini**
– Ein ljósmóður er sett sum leiðari á føðideildini á Landssjúkrahúsinum.

Sjúkrarøktarfrøðingurin, sum var leiðari á føðideildini, er sett frá og ístaðin er ein ljósmóður sett sum leiðari.

Men beint undir leiðaranum eru so tveir millumleiðarir settir á jøvnum føti, ein ljósmóður og sjúkrarøktarfrøðingurin, sum áður var leiðari.

Leiðslan á Landssjúkrahúsinm sigur, at hetta er ein fyribils loysn, tí áðrenn eitt ár er farið, skal lýsast eftir nýggjari leiðslu.

### 04. mai

**Fráboðan um verkfall**
Frá fríggjadegnum 6. mai kl. 08.00, verður nokta limum felagsins at taka upp arbeiði.

### 04. mai

**Metir verkfallið vera ólógligt**
– Leiðslan á Landssjúkrahúsinum hevur ongan sáttmála brotið, og má verfallið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum tí metast at vera ólóligt, sigur Hans Pauli Strøm, sum kortini framvegis ikki ætlar sær at leggja seg út í ósemjuna millum partarnar.

### 04. mai:

**Landsstýrið skjýtur málið inn fyri fútaréttin**

### 04. mai:

**16 yrkisfeløg mótmæla harðliga, at fútarætturin verður nýttur at loysa trupulleikar á føroyska arbeiðsmarknaðinum.**

### 05. mai:

**Fútabann móti verkfallinum**
Um 21 tíðina avgjørdi dómarin í fútarættinum, Peter Flügger, at verkfallið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum er ólógligt.

### 06. mai:

**Verkfallið avlýst!**
Verkfallið, ið varð lýst at verða 6. mai kl. 8. verður hervið avlýst vegna fútaforboð.

### 09. mai:

**Ætla at seta tiltøk í verk**
Starvsmannafelagið bjóðar 33 feløgum, sum hava sáttmála við fíggjarmálastýrið, til fundar. Ætlanin er at umrøða verkfallið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum, sum bleiv steðgað av fútabanni. (Sí viðmerking frá Gunleivi Dalsgarð aðrastaðni á síðuni).

# – Grov provokatión

**Starvsmannafelagið beyð mánamorgunin øllum feløgunum, sum hava sáttmála við Fíggjarmálastýrið til fundar. Tey góðtaka nevniliga ikki, at fútarætturin varð blandaður uppí málið um føðideildina.**
**– Hetta er grov provokatión, verður sagt**

FÚTABANNIÐ
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*Einki úrslir spurdist burturúr fundinum mánamorgunnin. Týsmorgunin verður ein nýggjur fundur har avgerð verður tikin um hvørji tiltøk skulu setast í verk*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Gunleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, var fámæltur mánamorgunin áðrenn fundin.

Hann greiddi frá, at Starvsmannafelagið er stigtakari til fundin, men ætlanin er at fáa eitt kjak í lag um tað, sum er farið fram í málinum um føðideildina.

– Vit ætla at tosa við hini feløgini, sum hava sáttmála við Fíggjarmálastýrið, fyri at hoyra hvat skal gerast í hesum málinum, greiðir hann frá.

Hann sigur, at tað ikki verður góðtikið, at fútarætturin verður brúktur til at sníkja danska arbeiðsrættin inn yvir føroysk starvsfólk, tí arbeiðsreglurnar í Danmark eru als ikki tær somu sum í Føroyum.

– Vit meta hetta sum eina sera grova provokatión. Í løtuni situr ein arbeiðsbólkur í Føroyum, og arbeiðir við at finna eina loysn, sum bæði arbeiðsgevarar og –takarar kunnu vera nøgdir við. Tað veit stýrið á Landssjúkrahúsinum fullvæl, og vit halda tað vera burturvið, at teir so nú skulu draga danskan arbeiðsrætt inn í føroysk viðurskiftið.

Gunleivur Dalsgarð greiðir frá, at arbeiðsbólkurin, sum arbeiðir við at finna eina føroyska loysn uppá trupulleikan við fútarættinum, hevur sitið síðani 2003, og roynt at funnið eina loysn, og at tað tí tykist sum ein provokatión, at danski fútarætturin hóast alt verður nýttur.

Spurdur um arbeiðsbólkurin er komin til nakra niðurstøðu ella nakra loysn í málinum, svarar Gunleivur, at tað eru teir ikki.

– Men teir arbeiða við at finna eina loysn, sum báðir partar á arbeiðsmarknaðinum kunnu góðtaka.

Spurdur hvat leiðslan á Landssjúkrahúsinum so átti at havt gjørt, tá teir hvørki kunnu nýta fútaréttin ella føroyska arbeiðsbólkin, sum enn ikki er komin til nakra niðrstøðu, svarar Gunleivur, at tað hevur hann onga viðmerking til.

– Eg havi ikki tíð at tosa longur, fólk byrja at koma á fund nú.

# Fútaforboðið bert fyribils

**Hvat er eitt fútaforboð í grundini. Og hvør hevur rætt í longu trætuni um føðideildina?**

FØÐIDEILDIN
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*

Fútarætturin kann bert geva eitt fyribils forboð ímóti arbeiðssteðgi. Eftir at fútaforboð er givið, skulu tað í mesta lagið ganga 7 dagar, innan málið verður beint víðari í Føroya rætt. Har verður so endaliga avgjørt, hvør hevur brotið sáttmálan.

Fyri vanlig fólk er tað ilt at taka dagar ímillum hvør hevur rætt og hvør hevur skeivt í málinum um føðideildina.

### Hvør sigur hvat

Sjúkrarøktarfrøðingarnir siga, at tað er stýrið á Landssjúkrahúsinum og Almanna– og Heilsumálaráðið, ið hava brotið sáttmálan, við tað, at teir nú seta munandi bygnaðarbroytingar í verk. Tær føra fram, at sáttmálin verður brotin, tí ein annar starvsbólkur nú skal umsita teirra økið,m sum er røkt av sjúkum pinkubørnum.

Hinvegin siga sjúkrahússtýrið og Almanna– og Heilsumálaráðið seg ikki hava brotið nakran sáttmála. Tað er kravt av teimum at spara 3,5 mió. Tað gera teir m.a. við at útnytta arbeiðsorkuna hjá jarðamøðrunum betri, við tað, at tær nú eisini koma við í arbeiðið á føðideildini, eftir at barnið er føtt. Hetta er nakað, sum jarðamøðurnar leingi hava havt ynski um, og eru egnaðar til at gera. Stýrið sigur, at um sjúkrarøktarfrøðingarnir fara í verkfall, eru tað tær, ið bróta sáttmálan. Tær hava nevniliga friðarskyldu í sáttmálaskeiðnum.

Talan er sostatt um ein tulkingarspurning. Og einasti hátturin, sum leiðslan kann steðga einum, eftir teirra meting, ólógligum verkfalli, er við at fara í fútaréttin. Fútarætturin verður nýttur, tá eitt mál hevur skund og ein avgerð skjótt má finnast. Í hesum førum varð avgerðin, at verkfallið var ólógligt, tí stýrið ikki brýtur sáttmálan við ætlaðu samanleggingunum. Fútabann varð tí givið.

Avgerðin hjá fútarættinum, saman við restini av málinum, verður síðani beint í Føroyarætt, har ein endalig avgerð verður tikin.

Fútaforboðið er sostatt bert galdandi til Føroyarættur hevur sagt nýggjan dóm í málinum. Óvist er nær tað verður.